**Christian Andreasen**
**løgtingsmaður**

**Broytingaruppskot**
**til**
**2. viðgerð av**

**løgtingsmáli nr. 40/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin)** (Samkynd verða javnsett við hinskynd foreldur)

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

**1.** Frágreiðandi heitið á løgtingslógini verður strikað.

**2.** Í § 1 verður § 4 a orðað soleiðis:
"**§ 4 a.** Hóast ásetingarnar í hesi løgtingslóg kann persónur, sum einsamallur er foreldur at einum barni, sjálvur avgera, hvussu tey rættindini, sum sambært hesi løgtingslóg eru tillutað hinum foreldrinum, skulu verða brúkt. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, hvussu skipanin skal umsitast, undir hesum um fráboðan, skjalprógvan og annað."

**3.** § 2 verður orðað soleiðis:

"**§ 2**

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Henda løgtingslóg er galdandi fyri foreldur at barni, har seinasta útgjaldið úr Barsilsskipanini ikki er útgoldið."

**Viðmerkingar**
Við hesum uppskoti verður staðfest, at rættindini úr Barsilsskipanini fylgja barninum. Hetta verður gjørt soleiðis, at tann, ið er einsamalt løgfrøðiligt foreldur at einum barni, sjálvur avger, hvussu barsilsfarloyvið og barsilspeningurin, sum er tillutað hinum foreldrinum verður brúktur. Hesar reglur eru bert galdandi í teimum førum, har bert ein persónur er løgfrøðiligt foreldur at einum nýføddum barni. Við einsamalt foreldur meinast her við, har eingin annar er løgfrøðiligt foreldur at barninum.

Barsilspeningurin, sum kann gjaldast út við heimild í § 4 a, verður roknaður eftir inntøkuni hjá tí foreldrinum, ið er einsamalt foreldur at barninum. Hetta hóast rættindi at vera í barsilsfarloyvi, og harvið at fáa útgoldið barsilspening, verður brúkt av øðrum persóni, og hóast hesin persónur hevur hægri inntøku. Útrokningargrundarlagið fylgir ásetingunum í løgtingslógini annars. Hetta merkir, at útrokningargrundarlagið er tengt at tí, ið er einsamalt løgfrøðiligt foreldur at barninum.

Harumframt verður frágreiðandi heitið strikað.

**Á Løgtingi, 9. februar 2021**

Christian Andreasen